# ...n stílin

spælbýtið verið javnt. Andy Olsen var raskur á NSÍ liðnum, har verjan tó vísti seg at hava stórar trupulleikar.

Eftir steðgin lagaði tað seg fult og heilt eftir fyritreytunum hjá EB/Streymi, og NSÍ trupulleikarnir í verjuspælinum, sum 4-4 á Sevmýri hevði givið ábendingar um, vórðu lagdir á blik. Marni Djurhuus og Ronnie Samuelsen vóru stinnir á sentrala miðvøllinum, og Sorin Anghel staðfesti, at kurvan hjá honum framvegis gongur rætta vegin.

Tá ið EB/Streymur legði seg framum 3-2, hjálpti NSÍ væl til, áðrenn Teitur Joensen spældi inn um verjuna til Sorin Anghel, sum smekkaði upp í hornið.

So var neyðugt hjá NSÍ at leggja meiri fyri í álopspartinum. Tað fingu teir einki burturúr, m. a. tí Rene Tórgarð í EB/Streyma málinum var ógvuliga stinnur, men í hinum endanum bar hugflogið hjá gestunum og holini í NSÍ verjuni, sum minti mest sum illa skrætt trol, tvey mál afturat við sær. Teitur Joensen skoraði til 4-2, tá ið hann smoygdi sær framum Jens Martin og stýrdi innleggi úr høgru frá Egili á Bø í málið, og innskifti Sonni L. Petersen setti síðsta naglan í móti sínum gomlu liðfeløgum. Fyrst vann hann bóltin av NSÍ, spældi Sorin, sum setti ferð á, legði upp á tvørs aftur til Sonna, sum takkaði fyri, og so hevði EB/Streymur fyri fyrstu ferð vunnið í Runavík, og tað var vorðið sum sigur. 5-2 og staðfesting av, at EB/-Streymur í løtuni er mest undirhaldandi liðið at vera eygnavitni til.

fríggjadagin. Í fyrstu atløgu hava teir givið mær ein stivla at stuðla fótinum. Um brotið liggur so væl, sum teir siga, at tað ger, so verður talan um steðg í fýra vikur. Um tað ikki liggur væl, so verður talan um skurðviðgerð, staðfestir óhepni Hans Pauli Samuelsen, sum heldur tað vera lítið sannlíkt, at hann aftur fer at spæla í ár.

- Eg havi ongantíð áður havt serligan skaða at dragast við. So nú eri er noyddur at bíta hetta í meg, og móti NSÍ stóðu teir seg sanniliga væl, men tað er einki stuttligt at vera uttanfyri!



*Vágbingar hildu seg hava fult tamarhald á øllum. Men eftir steðgin koppaði javnvágin, soleiðis at fuglfirðingar kortini fingu eitt kærkomið stig - meðan VB misti tvey, sum vildu verið minst eins kærkomin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÍF-VB 3-3 (1-3):

# VB misti trygga leiðslu

**Hóast teir vóru undirmannaðir seinna partin av 2. hálvleiki, so megnaðu fuglfirðingar at stríða seg til eitt stig, eftir at teir høvdu ligið undir við tveimum málum**

ÍF-VB

*Jóannes Hansen*

Vágbingar vóru bæði fegnir og ikki, tá ið teir sunnudagin fóru úr Fuglafirði. Tað hevði eydnast teimum at fáa stigið, sum teir frammanundan kanska høvdu viljað selt dystin fyri, men teir høvdu mist sigurin, sum teir í steðginum tóktust hava kós ímóti, og sum teir seinna partin av 2. hálvleiki áttu at havt góðar fyritreytir at hildið tørn um. Vinstri vongverjin hjá ÍF, Rúni Elttør, fekk gult kort í 34. minutti, og tá ið hann í 68. minutti aftur sá gult fyri takling, sum dómarin, Eiler Rasmussen, metti vera so mikið ógvusliga, at kort skuldi gevast, so varð hann rikin av vøllinum, og harvið átti mótbrekkan hjá ÍF at verði uppaftur brattari.

Tá var støðan 3-2. Miðvallarin í høgru, Atli Petersen, hevði tríggjar minuttir eftir steðgin givið heimaliðnum mót av nýggjum, tá ið hann uttanvert brotsteigin hevði smekkað til. Tað var tjúkt fyri, og bólturin tók í onkran og snýtti Bjarna Johansen í VB málinum.

At munurin minkaði til eitt mál tóktist geva heimaliðnum mót um, at tað skuldi bera til at fáa stig burturúr. Teir vóru meiri nærlagdir, enn teir høvdu verið síðstu løtuna undan steðginum, og eisini eftir at teir høvdu mist ein mann, vístu teir góðan hugburð.

Lønina fingu teir, tá ið tað restaðu níggju minuttir. Miðverjin og veteranurin Símun Eliasen, sum hevur sera stóran týdning fyri ÍF liðið, royndi seg við frísparki væl uttanfyri brotsteigin, og bólturin small í nettakið.

Tað var eisini ÍF, sum legði bragdligari fyri. Bartal Eliasen var í ÍF álopinum saman við Sylla, meðan Poul Ennigarð var í miðverjuni saman við Símuni Eliasen. Bartal smekkaði í 7. minutti bóltin í málið eftir horna úr høgru og eitt sindur av aftur og fram.

Tríggjar minuttir seinni javnaði VB eftir fínt álop. John Poulsen, sum var ytstur á miðvøllinum í høgru, átti innleggið, og Dan Djurhuus var leysur í brotsteiginum og smekkaði í málið. Hetta var áttanda málið hjá honum í landskappingini í ár.

Og so var tað, at fuglfirðingar ikki tóktust hava givið sær far um, at dómarin hevði lagt tveir minuttir afturat vanligu leiktíðini í 1. hálvleiki. Í hvussu so er góvu teir hesa løtuna VB ófatuliga nógv pláss, og tað takkaðu vágbingar sjálvandi fyri.

Í báðum førum var álopsspælarin Nenad Zivanovic málskjútti. Í báðum førunum var hann leysur í brotsteiginum, og í báðum førunum vóru fýra fuglfirðingar í nánd av honum, tá ið hann setti bóltin í málið!

### Sum nátt og dagur

Hjá teimum, sum stríðast fyri at sleppa undan aftastu plássunum og harvið møguleikanum fyri niðurflyting, vísir tað seg ofta at vera stórur munur á avrikunum. Tílík lið eru ofta ikki nóg støðug. Soleiðis var tað eisini sunnudagin. Báðir partar høvdu undan botngysaranum givið til kennar, at talan var um sonevnda seks stiga uppgerð, og báðir partar høvdu gjørt nógv fyri at seta seg upp.

Hjá ÍF stemmaði einki í 1. hálvleiki, tá ið teir vóru jánkasligir. VB var leikliga omaná, og teir kndu havt fingið fleiri mál. Milan Kuljic, sum enn eina ferð vísti seg at vera ein tann besti miðvallarin í landinum, sendi fríspark í tvørtræið aftanfyri Jacob Kaas. Saman við Kuljic var Edvard Ble á sentrala miðvøllinum, og hann var sannur brandur.

Eftir steðgin var hugburðurin hjá heimaliðnum góður, og tá megnaði VB ikki at halda tørn.Heldur ikki hóast teir seinna partin av 2. hálvleiki vóru yvirmannaðir.

Nú skal ÍF í Gundadal at spæla móti B36, og VB skal til Klaksvíkar. Hjá báðum er talan framvegis um møguleika at detta burturúr bestu deildini.

## FAKTA UM DYSTIN

**ÍF-VB 3-3 (1-3)**
1-0: Bartal Eliasen 7.
1-1: Dan Djurhuus 10.
1-2: Nenad Zivanovic 45.
1-3: Nenad Zivanovic 45.
2-3: Atli Petersen 48.
3-3: Símun Eliasen 82.
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**ÍF:** Jacob Kaas - Áki Petersen, Poul Ennigarð (Bárður á Lakjuni, 58.), Símun Eliasen, Rúni Elttør - Atli Petersen, Emil Nolsøe Leifsson, Høgni Zachariassen, Hanus Eliasen - Sylla D. Ahmed (Jonn Thomsen 79.), Bartal Eliasen
**Gult kort:** Rúni Elttør, Bartal Eliasen, Emil Nolsøe Leifsson
**Reytt kort:** Rúni Elttør 68. (tvey gul kort)
**VB:** Bjarni Johansen - Mortan úr Hørg, Súni í Hørg, Anders Nielsen, Jákup Olsen - John Poulsen (Birni Kjærbæk, 88.), Edvard Ble, Milan Kuljic, Poul N. Poulsen (Jón K. Poulsen, 90.) - Dan Djurhuus, Nenad Zivanovic
**Gult kort:** Milan Kuljic, Anders Sørensen